Nr. 8/2020

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi eldraøkinum settur Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Metir landsstýrismaðurin, at umstøðurnar á eldraøkinum eru nøktandi í dag?
2. Metir landsstýrismaðurin, at starvsfólkanormeringin á eldraøkinum er nøktandi í dag?
3. Metir landsstýrismaðurin, at lóggávan, fíggjarviðurskiftini og starvsfólkaviðurskiftini á eldraøkinum eru nøktandi í dag?
4. Nær kunnu vit vænta, at kommunur og land gera eina eftirmeting av eldraøkinum?

Viðmerkingar

Eldraøkið hevur síðan 1. januar 2015 verið umsitið av kommununum, og landsstýrisfólkið við almannamálum hevur havt eftirlit á økinum vegna Løgtingið. Tá økið varð lagt út til kommunurnar, varð ásett, at lógirnar, sum skipa eldraøkið, skuldu endurskoðast fimm ár seinni. Í ár eru fimm ár liðin, men framvegis er eingin eftirmeting gjørd. Í § 52 a fyrispurningi til landsstýrismannin í juni mánaði, spurdi undirritaði eftir eftirmetingini, og svarið frá landsstýrismanninum var, at innleiðandi fundir høvdu verið, men at arbeiðssetningurin ikki var klárur.

Javnan er at síggja og hoyra í miðlunum, at tørvurin á starvsfólkum á eldraøkinum er stórur, og tí elvir tað til stúran um umstøðurnar hjá okkara elstu borgarum. Vit koma skjótt inn í seinasta ársfjórðingin í ár, og eftirmetingin kann ikki útsetast nógv meira. Tørvur er m.a. á at fáa staðfest, hvørt afturberingarleisturin er nøktandi, um markamótini millum kommunur og millum land og kommunur eru nóg greið, um kommunalu samstørvini virka eftir ætlan, so tey eldru fáa nøktandi tænastur um alt landið, um normeringin er nóg høg og um starvsfólkaviðurskiftini eru í lagi. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 20. august 2020

Heðin Mortensen